TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2014-14 |
| Fundardagur | 17. november 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Bjarni Hammer, Jens Johannesen, Marit Poulsdóttir, Hallur í Heiðunum, Anita Vibergsdóttir og Marjun Olsen.
Skrivari: Jónleyg J. Bech

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Skattainntøkur 2014 | 2 |
| 2 | Fíggjarætlan 2015 | 2 |
| 3 | Fastognir og leigusáttmálar hjá kommununi | 3 |
| 4 | Møguligt skjalasavn á Tvøroyri | 5 |
| 5 | Játtan til skúlagarðsbólkin | 5 |
| 6 | Rundskriv um musiknevnd | 6 |
| 7 | Telefonendurgjald til býráðslimir | 6 |
| 8 | Mannagongd tá søkt verður um teym | 7 |
| 9 | Nýggj spælistova til dagrøktina á Tvøroyri | 8 |




Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2014-14 |
| Fundardagur | 17. november 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**25.00.00-Ø00-1-14**

## 1. Skattainntøkur 2014

### Málsfrágreiðing

**Fíggjarnevndin, 3. november 2014, pkt. 1:**

Borgarstjórin kunnar um skattainntøkurnar fyri oktober og fyri árið sum heild.

### Avgerð

BOrgarstjórin kunnar um skattainntøkurnar fyri oktober og fyri árið sum heild.

### Skjøl

- VS Skattatøl
- VS Skattur til okt. 2014.xlsx

**00.30.00-S00-1-14**

## 2. Fíggjarætlan 2015

### Málsfrágreiðing

**Fíggjarnevndin, 8. oktober 2014, pkt. 2:**

Einmælt samtykt at arbeiða víðari við 3. uppskoti til fíggjarætlan, so at hetta kemur at javnvega. Eisini verður mælt til at hava ein temadag um fíggjarætlanina, tá skattainntøkurnar fyri oktobur fyriliggja.

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2014-14 |
| Fundardagur | 17. november 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Býráðið, 8. oktober 2014, pkt. 2:**

1. viðgerð av figgjarætlan fyri 2015:

Einmælt samtykt at skattaprocentið verður 23,5% og barnafrádrátturin verður 5.000,-

Einmælt samtykt at arbeiða víðari við 3. uppskoti til figgjarætlan, so at hetta kemur at javnviga.
Einmælt samtykt til at hava temadag um figgjarætlanina 10. november kl. 9.

### Avgerð

Málið verður útsett til komandi fund.

### Skjøl

- 3. uppskot

**82.00.00-P00-1-13**

## 3. Fastognir og leigusáttmálar hjá kommununi

### Málsfrágreiðing

**Havnarnevnd, 6. oktober 2014, pkt. 9:**
Tummas Sørensen kunnaði um arbeiðið við at dagføra leigusáttmálar.

**Tekniska nevnd, 6. oktober 2014, pkt. 2:**
Tummas Sørensen kunnaði um arbeiðið við at dagføra leigusáttmálar á øllum kommunalum ognum.Tá arbeiðið er liðugt, verður tað lagt fyri nevndina aftur. Krav til sáttmalar við privatfólkum er, at tey verða tilmeldað gjaldsskipan.

**Figgjarnevndin, 8. oktober 2014, pkt. 4:**

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2014-14 |
| Fundardagur | 17. november 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Mælt verður til at tikið verður undir við uppskotinum til leigugjøld frá teknisku deild (sí viðhefta teldupostin), tó við hesum broytingum:

pkt. 10 leigugjald fyri grundøki til neyst. Mælt verður til at leigugjaldið verður kr. 500 árliga fyri grundøki upp til 70 m2 og hareftir 30 kr. fyri hvønn m2 yvir 70 m2.

pkt. 11 fellur burtur, tí hetta verður umfatað av pkt. 10.

pkt. 13 verður broytt til 40 kr. fyri m2.

pkt. 15 til og við 19 verður gjaldið 100 kr. fyri hvørjar byrjaðar 1000 m2.

Tey, ið hava leigusáttmálar, skulu ganga undir hesar treytir. Tey økir, ið ongin sáttmáli er gjørdur um, verða lýst leys.

**Avgerð**

Einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum til leigugjøld frá teknisku deild (sí viðhefta teldupostin), tó við hesum broytingum:

pkt. 10 leigugjald fyri grundøki til neyst. Mælt verður til at leigugjaldið verður kr. 500 árliga fyri grundøki upp til 70 m2 og hareftir 30 kr. fyri hvønn m2 yvir 70 m2.

pkt. 11 fellur burtur, tí hetta verður umfatað av pkt. 10.

pkt. 13 verður broytt til 40 kr. fyri m2.

pkt. 15 til og við 19 verður gjaldið 100 kr. fyri hvørjar byrjaðar 1000 m2.

Tey, ið hava leigusáttmálar, skulu ganga undir hesar treytir. Tey økir, ið ongin sáttmáli er gjørdur um, verða lýst leys.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2014-14 |
| Fundardagur | 17. november 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Einmælt samtykt at krevjast skal inn árliga.

**Skjøl**

- Gjølr til leigusáttmálar 08.10.2014

**19.02.00-A00-2-13**

## 4. Møguligt skjalasavn á Tvøroyri

### Avgerð

Limirnir í mentanarnevndini mæla til, at Tvøroyrar Skjalasavn verður skipað sum partur av Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavni. Býráðið játtar stovninum stuðul at nýta á hvørjum øki sær. Tilmælið frá Anitu Vibergsdóttir einmælt samtykt.

**Skjøl**

- Dagsordenspunkt Møguligt skjalasavn á Tvøroyri behandlet på mødet 10. desember 2013 kl. 19 00 (Býráðsskrivstovan) i Býráðið (2013)

**82.11.01-S00-1-14**

## 5. Játtan til skúlagarðsbólkin

### Málsfrágreiðing

**Mentarnarnevndin mælir til, 4. november 2014, pkt. 6:**

Mælt verður til, at skulagarðsbólkurin kann brúka oyramerktu játtanina fyri í ár.

### Avgerð

Einmælt samtykt, at oyramerkingin av játtan til skúlagarðsbólkin stendur við fyri 2014.

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2014-14 |
| Fundardagur | 17. november 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**20.07.00-A00-1-14**

## 6. Rundskriv um musiknevnd

### Málsfrágreiðing

**Mentanarnevndin, 4. november 2014, pkt. 7:**

Mælt verður til at mótmæla ætlaðu broytingunum og at kommunufelagið eigur at halda fast um at ongar sakligar grundgevingar eru fyri, hví ávís øki í landinum skulu missa sína umboðan í musiknevndini.

### Avgerð

Einmælt samtykt at mótmæla ætlaðu broytingunum og at kommunufelagið eigur at halda fast um at ongar sakligar grundgevingar eru fyri, hví ávís øki í landinum skulu missa sína umboðan í musiknevndini.

### Skjøl

- Teldupostur frá Sands Kommunu
- Teldupostur frá Eyðun um musiknevndina
- Okkara viðmerkingar
- Uppskot til nýtt rundskriv
- Galdandi rundskriv

**81.20.00-A00-1-14**

## 7. Telefonendurgjald til býráðslimir

### Avgerð

Málið verður beint aftur í fíggjarnevndina.

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2014-14 |
| Fundardagur | 17. november 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Skjøl**

- Reglar viðv. fríari telefon

**08.13.00-A00-1-14**

## 8. Mannagongd tá søkt verður um teym

### Málsfrágreiðing

**Havnarnevnd, 18. august 2014, pkt. 3:**
Havnarmeistarin framlegði uppskot um leigu av teymi.

Nevndin samtykti at uppskotið skal rættast til og leggjast aftur fyri nevndina.

Leigusáttmálir skulu gerast við komandi og verandi leigarar av teymi.

**Havnarnevnd, 6. oktober 2014, pkt. 1:**

Reglugerðin er samtykt við teimum neyðugu tillagingum til Tvøroyrar havn. Hon kemur í gildi 1. januar 2015.

### Tilmæli frá havnarmeistaranum

Ætlanin er, at hon kemur í gildi 1/1-2015, men eg vil fegin hava hana út til bátaeigarar áðrenn, so teir kunnu venja seg við tankan.

Vinarliga / Best regards  Jón Bogi Guttesen Havnarmeistari / Harbour Master

### Avgerð

Reglugerðin fyri bátahyljar hjá Tvøroyrar Havn einmælt samtkyt smb. hjálagda uppskoti.

**Skjøl**

- Reglugerð 2015.pdf

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2014-14 |
| Fundardagur | 17. november 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**16.00.00-69-14**

## 9. Nýggj spælistova til dagrøktina á Tvøroyri

### Málsfrágreiðing

Nevndarforkvinna mælir til, at spælistovan í Hovi verður flutt til tað minna høli hjá frítíðarskúlanum. Samstundis skal frítíðarskúlin flyta yvir í hølini hjá útibarnagarðinum, og útibarnagarðurin í tað størra høli hjá fríðtíðarskúlanum. Neyðugt er tó at útibarnagarðurin hevur atgongd til høli, har vát klæði og annað verða hongd.

### Sosiala deild mælir til, 4. november 2014, pkt. 1:

Sosiala deild mælir til at fylgja tilmælinum hjá nevndarforkvinnuni. Stórt ónøgdsemi er bæði millum foreldur og starvsfólk um spælistovuna í Hovi, samstundis hevur dagrøktin tørv á peningunum, sum verður brúkt til húsaleigu til nógv onnur ting, t.d. nýggjar vognar.

### Sosiala nevnd, 4. november 2014, pkt. 1:

Einmælt samtykt, at spælistovan hjá dagrøktini á Tvøroyri skal flytast frá Hovs skúla til høli hjá kommununi í Trongisvágs skúla. Hetta inniber at annaðhvørt útibarnagarðurin ella frítíðarskúlin kemur at missa eitt høli. Tí verður mælt til at fáa leiðarnar fyri alt barnaansingarøkið til ein samráðingarfund t. 6. november kl. 10 um skipan av hølunum.

### Avgerð

Limirnir í sosialu nevnd mæla til at flyta spælistovuna hjá dagrøktini úr Hovs skúla til Trongisvágs pr. 1. januar 2015. Atkvøðugreiðsla um tilmæli: 7 atkvøður fyri, ongin ímóti, einmælt samtykt at flyta spælistovuna úr Hovs skúla til Trongisvágs pr. 1. januar 2015.

Anita Vibergsdóttir skýtur upp, at dagrøktin fer í minna hølið hjá frítíðarskúlanum, at frítíðarskúlin fer í tað størra hølið av hølunum, hann hevur í dag, og at útibarnagarðurin verður verandi har, hann er. Atkvøðugreiðsla um broytingaruppskotið frá Anitu Vibergsdóttir: Tvær artkvøður fyri og fimm

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2014-14 |
| Fundardagur | 17. november 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

atkvøður ímóti. Anita og Hallur atkvøddu fyri; Kristin, Marit, Bjarni, Jens og Marjun atkvøddu ímóti. Broytingaruppskotið fallið.

Atkvøðugreiðsla um tilmæli frá Marit Poulsdóttir um, at spælistovan hjá dagrøktini flytur í minna hølið hjá frítíðarskúlanum, frítíðarskúlin flytur í hølini hjá útibarnagarðinum og útibarnagarðurin flytur í størra hølið hjá frítíðarskúlanum. Hon mælir eisini til, at tað framyvir verður møguleiki fyri at flyta millum hesi hølini í barnaansingini eftir summarferiurnar alt eftir barnatalinum. Fimm atkvøður fyri og ongin atkvøða ímóti. Kristin, Bjarni, Marit, Jens og Marjun atkvøddu fyri, Hallur og Anita atkvøddu ikki.

**Skjøl**

- Tilmæli frá stovnsleiðsluni
- tilmæli sosiala nevnd 6. nov. 14

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 2014-14 |
|---|---|
| Fundardagur | 17. november 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin Fundur lokin**

Kristin Michelsen:________________

Bjarni Hammer:________________

Hallur í Heiðunum:________________

Anita Vibergsdóttir:________________

Marjun Olsen:________________

Jens Johannesen:________________

Marit Poulsdóttir:________________